# Hetta er seinasti møguleiki at finna avloysaraskip fyri Smyril

*Strandferðslan kannar nú eitt skip, sum kanska verður leigað til at loysa Smyril av. Tekniski stjórin sigur, at hetta er seinasti møguleikin, sum er eftir*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Nú er tað mangt sum bendir á, at hetta verður ferjan, sum fer at sigla fyri Smyril, ímeðan hann er á beding í summar. Strandferðslan sigur, at hetta er seinasti møguleikin at útvega eitt líkinda skip til suðuroyarsiglingina. Hendan ferjan er ensk og hon tekur 50 bilar og 300 ferðafólk. Umboð fyri Strandferðsluna eru nú uttanlands og hyggj eftir henni*

Í hesi vikuni eru umboð fyri Strandferðsluna aftur farin uttanlands at hyggja eftir eini ferju, sum møguliga kann útvegast til at sigla fyri ímillum Havnina og Suðuroynna fyri Smyril, ímeðan hann er á beding.

Smyril skal á beding mánamorgunin 15. mai. Tað er longu um 10 dagar.

Smyril er uppslitin, so dokklistin hevurferð er rættiliga langur og væntandi fer tað at taka einar seks vikur at gera alt, sum gerast skal. Men Strandferðslan vónar, at hann kann setast í sigling aftur á jóansøku.

Higartil hevur Strandferðslan ikki havt ráð til at leiga eitt brúkiligt skip at avloysa Smyril. So hóast hon hevur havt onkur væl hóskandi skip upp á hondina, hevur hon verið noydd at sagt leigumálið frá sær, tí játtanin frá Løgtinginum hevur verið ov lítil til, at hon hevur hættað sær undir eitt leigumál. Eitt nú stóð Strandferðsluni fyrr í ár í boði at leiga finsku ferjuna Alandiu, ið var skræddaraseymað til endamálið, men eisini tað leigumálið fór í vaskið tí at ongin peningur varð tøkur.

Nú eru tað kortini næstan tveir mánaðir síðani, at Landsstýrið legði uppskot fyri tingið um at játtað Strandfeðsluni meiri játtan.

Og mánadagin bleiv greitt, at ein samd fíggjarnevnd tekur undir við, at lata Strandferðsluna fáa tær 7,5 milliónirnar afturat, sum hon hevur biðið um.

Trupulleikin er annars væl kendur, tí nú er eitt hálvt ár síðani, at Strandferðslan gjørdi vart við, at 7,5 milliónir komu at resta í fyri at kunna varðveita tænastuna á einum hampiligum støði í ár.

Tá ið tað gjørdust greitt, at Løgtingið ikki varð sinnað at játta peningin á fíggjarlógini, bað Strandferðslan um loyvi til at hækka ferðaseðlaprísin, men tað noktaði Løgtingið eisini fyri.

Tí kom Strandferðslan í peninganeyð, sum m.a. hevur ført við sær, at tað ikki hevur borið til at útvega eitt hóskandi skip til Suðuroyarsiglingina. Og tann verður nústani loystur nú við eykajáttanini, sum nú er á borðinum.

**Seinasti møguleikin**

Og nú hevur Strandferðslan aftur eitt skip í kikaranum, sum tað kanska ber til at leiga at sigla ímillum havnina og Suðuroynna tær seks vikurnar í summar, ímeðan Smyril er á beding.

Talan er um ferjuna „Claymore“ hjá stóra, enska skipafelagnum P&O. Hetta er eitt kombinerað farmaskip/ ferðamannaskip, sum tekur 300 ferðafólk og 50 persónbilar, ella 12 treylarar. Tað er 77,2 metrar langt, 16,3 metrar breitt og siglur 14 míl. Tað hevur 3.400 hestar.

Hetta er eitt skip, sum er væl minni enn Smyril, men kortini størri enn Dúgvan, tí hon tekur bara 38 persónbilar.

Men so tekur Dúgvan afturímóti 352 ferðafólk og tað eru eitt sindur fleiri enn „Claymore“

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at nú verður kannað, um skipið kann brúkast, og um tað ber til at fáa avtalu við felagið sum eigur skipið. Men tað hevði hann varhugan av, skuldi borið til.

Hann hevur eisini varhugan av, at prísurin er rímiligur. Somuleiðis skal kannast, um Skipasýnið góðkennir skipið.

Tekniski stjórin á Strandferðsluni sigur, at hetta er avgjørt seinasti møguleikin at fáa eitt skip at loysa Smyril av í summar.

Sum sagt eru bara 10 dagar eftir, til Smyril skal á beding og at tekur sína tíð at rigga eitt leiguskip til, fáa tað góðkent og at fáa tað til Føroyar og teir vita ikki um nakað annað skip, sum kann brúkast.

# Pengarnir kundu blivið brúktir betri

*– Hetta kann blíva ein óloysiligur trupulleiki, sigur Eli Davidsen, sum harmast um, at Løgtingið hevur økt munandi um pappírsarbeiðið*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Eli Davidsen fegnast um nýggju lógina, men heldur, at hon blívur óneyðuga dýr og í ringasta føri kann hon blíva ein óloysiligur trupulleiki*

Eli Davidsen, leiðari á Arbeiðseftirlitinum, er sera fegin um, at tað loksins sær út til, at vit fáa eina lóg um arbeiðsumhvørvið.

Løgtingið hevur samtykt lógina við 2. viðgerð, men tað skal hava eina viðgerð afturat, áðrenn hon er endaliga samtykt.

Eli Davidsen heldur, at tað nú var uppá tíðina, at eisini vit nú fáa eina arbeiðsumhvørvislóg.

– Vit eru einasta land um okkara leiðir, sum ikki hevur eina slíka lóg og vit hava sóknast eftir henni í meiri enn 10 ár.

Leiðarin á Arbeiðseftirlitinum sigur, at arbeiðsumhvørvislógin hevur greiðari ásetingar enn tann gamla arbeiðaraverndarlógin.

Og, sum navnið sigur, tekur hendan nýggja lógin eisini arbeiðsumhvørvið, tvs, trivnaðin við og umfatar ikki bara maskinverju, sum tann gamla gjørdi.

**Kann kosta dýrt.**

Men hóast hann fegnast um nýggju lógina, harmast hann kortini um, at Løgtingið samstundis hevur gjørt eina samtykt, sum kemur at føra útreiðslur við sær, sum eftir hansara tykki eru óneyðugar. Og í ringasta føri kann hendan løgtingssamtyktin gerast ein heilt óloysiligur trupulleiki.

Løgtingið samtykti nevniliga at strika tann partin í uppskotinum hjá Landsstýrinum sum sigur, at tær donsku kunngerðirnar kunnu verða settar í gildi í Føroyum.

– Fyrr varð tað so, at tað varð lýst í eini lítlari kunngerð í Kunngerðarblaðnum, at tann og tann danska kunngerðin var nú eisini galdandi í Føroyum. Men nú hevur Løgtingið kravt, at allar kunngerðirnar, sum verða settar í gildi í Føroyum, verða lýstar í Kunngeðrarblaðnum í síni heild.

Og tað heldur hann, fer at føra trupulleikar við sær.

– Nógvar av kunngerðunum eru rættiliga umfatandi. Eitt nú er kunngerðin um „markvirði fyri evni og tilfar“ næstan 900 síður- og hon er ikki eindømi.

–Sostatt kemur arbeiðseftirlitið at eiga fleiri Kunngerðarbløð einsamalt - og tað verða Kunngerðarbløð, sum í vavi verða sum tjukkar bøkur. Og tað heldur Eli Davidsen er óneyðugt peningabrúk, tí teir føroyingar, sum hava áhuga í hesum kunngerðum, kunnu teljast á einari hond.

Men hann leggur afturat, at skal løgtingssamtyktin eisini skiljast soleiðis, at kunngerðirnar skulu týðast til føroyskt, er hetta ein ovurhondss stór uppgáva.

– Í hvussu so er verður hetta ein óloysilig uppgáva hjá Arbeiðseftirlitinum, tí so skulu vit seta eina rúgvu av fólki afturat, bara til tað, sigur Eli Davidsen.

Tí heldur hann undantak eigur at verða gjørt fyri tær stóru kunngerðirnar, so at tær ikki skulu lýsast í Kunngerðarblaðnum síni heild.



# Fóðurhøll í Hvalvík

*Nýggja goymsluhøllin hjá Skretting í Hvalvík varð tikin í nýtslu týsdagin*



*Erlend Waatevik, Oddvar Strand og Niels Andreas Mortensen frá Skretting framman fyri nýggju høllini*

**Mynd:Jens Kristian Vang**

Edvard Joensen

Skretting Føroyar hevur latið eina stóra goymsluhøll til alifóður byggja í Hvalvík. Týsdagin varð høllin alment tikin í nýtslu, hóast arbeitt hevur verið í høllini síðan á nýggjárinum.

Skretting Føroyar, ið er dótturfelag hjá Skretting í Noreg, sum hollendska stórfyritøkan Nutreco aftur eigur, hevur bygt eina høll upp á 2.000 fermetrar. Talan er um eina goymsluhøll til alifóður. Í hesum bygninginum er eisini ein 80 fermetra stór skrivstova.

Stóra goymsluhøllin rúmar 2.500 tonsum av fóðri. Fóðrið verður innflutt úr Noreg. Fóðri verður flutt við farmaskipi, sum leigað er til endamálið. Í løtuni er tað Nordic hjá Nordic Line í Havn, sum flytir fyri Skretting.

Skretting Føroyar selur eini 12.000-15.000 tons av fóðri árliga. Hetta svarar til gott 20% av samlaða brúkinum í Føroyum, sigur Jórun Johannesen hjá Skretting Føroyar. Skretting Føroyar selur meira enn helvtina av tí smoltfóðri, føroyingar brúka.

Byrjað varð upp á høllina seinasta summar. Men illveðrið seinasta heyst gjørdi eitt sindur av skaða, sum seinkaði arbeiðinum nakað.

Nú høllin alment verður tikin í nýtslu, eru fólk frá Skretting í Noreg í Føroyum og vitja.

# Hampilig útlit hjá hotellunum

*Á hotellunum kring landið hava tey hampiligar vónir til komandi summarið. Fleiri fyrispurningar eru komnir í ár, enn teir vóru um somu tíð undanfarin ár, siga tey*




*Á Hotel Øravík meta tey, eins og aðrastaðni, at útlitini eru ikki verri enn undanfarin ár*

EDVARD JOENSEN

Hotellini kring landið siga frá góðum vónum fyri summarið, sum stendur fyri durum.

Nú vit eru farin inn í mai, fara summargestirnir so smátt at gera vart við seg.

Á Hotel Eiði er ikki latið upp aftur enn, hóast vanligt hevur verið at byrja fyrsta mai. Hans Petur Poulsen, stjóri, sigur, at okkurt skeið, sum varir vikuna út, er á hotellinum í løtuni, og hann hevur valt at gera tað liðugt, áðrenn hann letur uppaftur.

Hans Petur sigur, at hann hevu hampiligar vónir til summarið. Sum enn sær út, verður tað helst ein rólig byrjan, sum hann tekur til, men seinni á sumrinum sær betri út. Veitslur og eisini liggjandi gestir, sigur hann.

Annars sigur Hans Petur Poulsen, at skeiðvirksemið er vorðið ein góð inntøkukelda hjá hotellinum.

Á Hotel Norð á Viðareiði er nýggjur vertur júst byrjaður. Tað er Elisabeth Nybo, sum hevur leigað hotellið, Hon er kokkur og fer sjálv at taka sær av teirri síðuni. Annars eru vanliga eini fimm fólk til arbeiðis har á hotellinum um summarið, sigur hon. Um vikuskiftini, tá brúdleyp og tílíkt er, stendur heldur ikki á at fáa fólk.

Elisabeth Nybo sigur, at hon skal ikki klaga. Fleiri bíleggingar eru komnar. Og hon fegnast um, at tað er líkt til, at fólk hava funnið hotellið á Internetinum.

Umframt vanligu ferðafólkini eru eisini skeið og veitslur umbiðin í summar.

Leygarkvøldið verður mótasýning á Hotel Norð, har klædnahandlar í Klaksvík fara at vísa fram.

Á Hotel Øravík siga tey, at tað sær út til at fara at byrja spakuliga. Onkur bólkur hevur bílagt til summarið, men ikki serliga nógv enn. Tó meta tey, at tað er á leið tað sama, sum í fjør. Kanska betri, verður lagt aftrat.

Annars halda tey ikki, at fólk eru so tíðliga úti, tá talan er um bíleggingar har suðuri.

Á Hotel Vágum er hinvegin gongd í. Har verður sagt, at undirtøkan tykist betri enn bæði í fjør og fyrraárið.

Tað eru fólk, sum hava verið í Føroyum eina tíð, sum vitja hotellið, áðrenn tey fara avstað aftur, sigur Kári Hentze á Hotel Vágum.

Hann sigur, at líkt er til, at tað eru tiltøkini hjá Ferðavinnuni í Vágum, sum ferðafólkini fara til. Gongutúrar, siglitúrar og tílíkt.

Fríggja- og leygarkvøldið
05. & 06. mai
kl. 18.00 – 22.00

Meðan vit bíða:
Salatborð v/ skeljadjórablandi

Høvuðsverði:
Kagga Búffur
v/ bakaðum epli ella pommes frites, frískum grønmeti og whiskysós ella rómasós
Pipar Búffur
v/ bakaðum epli ella pommes frites, frískum grønmeti og piparsós
Svínamørbradmedaillion
v/ sjampignon a la creme og risole

Omaná:
Ís & frukt ella
kaffi & cognac/likør

3 rættir einans
170,-

Borð kann bíleggjast
á tel. 214170 ella 314170
Restaurant Kaggin

Sosialurin - 311820